# kkara vinnulív




*Við lívligum og frískum sangi settu tær sín serstaka dám á setanina av Faroexpo*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*Eftir setanarrøðu og sang beyð Árni Joensen øllum til vælbúgvið borð við breyði, viðskera, øðrum góðum bakstri og leskandi*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Vøksturin í nýggjum vinnum fremur menning




**- Nú heimurin er so opin fyri øllum – og vit eru opin fyri umheiminum, er so avgerandi neyðugt, at vit ikki krógva okkum burtur, men bjóða okkum fram – og eru kappingarførir, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum**

VINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, ásannar, at tað grør um gangandi fót í føroyskari vinnu.

- Eg haldi, at tað er ógvuliga positivt, at fólk duga at síggja møguleikar og duga at útvega sær vitan, eisini uttanfyri landoddarnar.

Sum landsstýrismaður í vinnumálum er Bjarni onga løtu í iva um, hvønn týdning tað hevur fyri vinnulívið og samfelagið alt, at fólk søkja sær vitan, bæði her heima og uttanlands.

**Vegurin fram**

- Ein slík vinnustevna sum Faroexpo bæði gevur vitan, eins og hon spjaðir vitan. Tað er ikki vist, at allar tær fyritøkur, sum eru við á stevnuni, heysta fruktir beinanvegin, men eg ivist onga løtu í, at sum frá líður er hetta vegurin at ganga – og samanlagt gevur hetta okkum heilt vist nakað at byggja á, bæði til vinnu og samfelag.

Hann vísir á, at slík tiltøk eisini hava sínar "síðugevinstirnir", sum hann tekur til, og í hesum førinum sipar landsstýrismaðurin eitt nú til ferðavinnu, flutning og tænastuvirksemi, sum av sær sjálvum verður knýtt at slíkum tiltøkum sum Faroexpo.

Hann leggur dent á, at eitt gott netverkið hevur so ómetaliga stóran týdning í heiminum í dag.

- Alt byggir á samskifti, upplýsing og vitan. Slík tiltøk sum hesi geva ein tilføring, har møguleikar eru fyri nýskapan – og at bróta upp úr nýggjum.

**Kappingarføri**

Landsstýrismaðurin vísir á, at nú heimurin er so opin fyri øllum – og vit somuleiðis eru opin fyri umheiminum, er so avgerandi neyðugt, at vit ikki krógva okkum burtur, men bjóða okkum fram – og eru kappingarførir.

- Vit eru partur av altjóðagerðini, og hetta setir í fyrsta lagi krøv til okkara vinnu – og til okkum øll, men í síðsta enda trúgvi eg, at hetta kemur at tæna okkum. Vit kunnu ikki renna undan altjóðagerðini, tí hon bankar eisini á dyrnar hjá okkum. Tískil mugu vit verða til reiðar at taka ímóti avbjóðingini, sum stendst av hesum.

Landsstýrismaðurin sigur, at øll ynskja, at føroyski búskapurin verður sjálvberandi, og tí kunnu vit ikki bara "snara" inneftir, men eisini stýra úteftir – og líta út í heimin, sum er uttanum okkum.

**Vinnur og menning**

Hann vísir á, at gongdin í føroyskari vinnu er hon, at aðrar vinnur í størri mun enn áður eisini eru farnar av kasta av sær til føroyska búskapin, og hetta fegnast hann sum landsstýrismaður í vinnumálum um.

- Hetta sigi eg ikki fyri á nakran hátt fyri at seta niður á fiskivinnuna, sum hevur – og framvegis er – okkara størsta útflutningsvinna. Men í samlaða búskapinum síggja vit, at aðrar vinnur rættiliga eru farnar at muna, og tað er ikki minst gongdin í hesum vinnum, sum er við til at fremja ta menning, sum er í samfelagnum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður